## Arbeiðsloysið veksur

Heldur fleiri íslendingar vóru arbeiðsleysir um seinasta mánaðarskiftið enn ein mánað frammanundan. Morgunblaðið skrivar, at arbeiðsloysið var 8,0 prosent síðst í november, og at tað var 0,4 prosentstig meiri enn síðsta oktober. Hagtølini vísa, at arbeiðsloysið var 8,5 prosent hjá monnum og 7,3 prosent hjá kvinnum tann 30. november. Hagtølini vísa eisini, at 7.300 av teimum, sum vóru arbeiðsleys í november, høvdu verið arbeiðsleys meiri í seks mánaðir ella meiri. Vinnumálaráðið væntar, at arbeiðsloysið fer at veksa í hesum mámnaðinum, so tað kemur upp á millum 8,1 og 8,6 prosent.



## Fekk heiðursteknið aftur

Herfyri løgdu iransku myndugleikarnir hald á heiðursteknið og heiðursskjalið, sum Shirin Ebadi fekk, tá hon fekk Nobel-friðarheiðurslønina í 2003, men nú hevur hon fingið bæði aftur. Tað siga uttanríkisráðharrarnir í Noregi og Svøríki, Jonas Gahr Støre og Carl Bildt, í einari felags fráboðan. Teir siga seg framvegis stúra fyri viðferðini, sum Shirin Ebadi kann fáa í heimlandinum. Hon hevur verið uttanlands teir seinastu mánaðirnar, og teir báðir uttanríkisráðharrarnir krevja, at hon sleppur heimaftur, og at hon fær frið, tá hon kemur aftur.



# Skeivar grund-gevingar fyri útbygging

**- Við støði í okkara royndum mugu vit siga, at vit duga ikki at síggja, at ein útbygging av flogvøllinum í Vágum fer at geva betur trygd og reglusemi, sigur Flog-skiparafelag Føroya Fornminnissavn**

FLOGVØLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Flogskiparar taka nú blaðið frá munninum og siga sína meining um útbygging av flogvøllinum í Vágum. Og tað er synd at siga, at teir stuðla undir grundgevingunum fyri at leingja vøllin.

»Flestu forðingarnar í Vágum eru ikki orsaka av einum ov stuttum vølli. Tær eru orsaka av vánaligum sýni, vindi av lágætt, (sunnan og útsynningur sunnan), og norðanvindi á vetri (síðuvindur og kavi)«, sigur Flogskiparafelag Føroya í skrivi.

Formaðurin í felagnum Rúni Højgaard, sigur við Rás2, at hann ikki persónliga kann úttala seg um, hvar í landinum best hevði veirð at lagt ein flogvøll, men vísir til tyrluskiparar, sum fyrr hava úttala seg í hesum málinum.

- Eg kann bara vísa til tyrluskiparar, sum fyrr hava úttala seg um, hvar best er at leggja ein framtíðar flogvøll, sigur Rúni Højgaard við Rás2.

Hann vil ikki gera nakrar viðmerkingar til, um tað er ein burturspilt íløga at leingja flogvøllin i Vágunum men sigur kortini somikið:

- Lat meg sláa fast, at allir flogskiparar ynskja ein longri flogvøll í Vágum, men um hetta fer at økja um reglusemi loyvi eg mær at ivast í. Hvat trygdini viðvíkur er tað einki mál, tí trygdin er í lagi. Tað er eingin flogskipari, sum lendir í Vágum, um trygdin ikki er í lagi, sigur Rúni Højgaard við Rás2.

### Skakkir

Hann skilir ikki, hví tað verður ført fram, at ein longri flogvøllur skal geva betri trygd.

- Vit operera undir tryggum viðurskiftum, eisini á flogvøllinum í Vágum í dag, so eg haldi ikki, at trygdin skal verða eitt argument fyri at leingja flogvøllin í Vágum, sigur Rúni Højgaard.

Tað hevur verið ført fram í seinastuni, at flogskiparanir hjá Atlantsflog høvdu fingið munnkurv.

- Vit gjørdust eitt sindur skakkir, tá vit fingu brævið, men tá vit nú eftirrationalisera dugi eg væl at síggja, hvat er hent, og eg skilji eisini væl stjóran hjá okkum, sum hevur verið úti og vart felagið, tí at flogskiparar eru skeivt endurgivnir um trygd og operationellu viðurskiftini her vesturi, sigur Rúni Højgaard.

Hann sigur, at tað hoyrir ikki heima, at slík skeiv tíðindi koma fram um felagið og skilir tí væl, at Magni Arge reagerar.

- At vit so kanska hava tulkað skrivið breiðari enn ætlað, tað skal eg ikki úttala meg um, men vit kunnu so staðfesta, at har er nakað ið ger, at vit eru nakað skerdir í okkara talifrælsi. Eftirfylgjandi er tað so staðfest, at sjálvandi hava vit loyvi at ðúttala okkum, men tá tað kemur til operationellu innanhýsis viðurskiftini, skal tað sjálvandi samskipast við leiðsluna, sigur rúni Højgaard.

### Bestu loysnina

Er so nøkur loysn, sum er betri enn hon, ið liggur á borðinum nú.

- Tað er júst spurningurin, ið øll seta sær sjálvum, og sum má svarast greitt, áðrenn farið verður undir eina útbygging av flogvøllinum har vesturi. Hvat gera vit, og hvat er langtíðar málið fyri flogviðurskifti í Føroyum sum heild, sigur Rúni Højgaard.

Hann sigur, at vísir tað seg, at útbygging av flogvøllinum í Vágum er besta loysnin, so eiga vit at taka tað til eftirtektar.

- Vit vija ikki blanda okkum í, hvar flogvøllurin skal liggja, vit vilja bara hava bestu loysnina, uttan mun til hvar hon so er, sigur Rúni Højgaard.

Hann sigur, at tað er so ómetaliga týdningarmikið fyri okkara land og okkara menning, at vit fáa bestu loysnina.

## Glyvursnes best

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar fingu vit fatur á Andrias Mouritsen, formanni í Tyrluskiparafelag Føroya, og hann staðfesti, at besta staðið at leggja nýggja flogvøll er á Glyvursnesi.

Tyrluskiparanir eru teir, ið kenna best til turbulens og flogviðurskifti yvirhøvur, og teir hava áður ðí Sosialinum staðfest, at Suðurstreym er best egnaða staðið, at leggja flogvøll í Føroyum.

Portalurin og Rás2 fylgja málinum.